# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

7. oktober fingu Annika Winther Klit og Karsten Klit, Lystrup, ein son ið var 50 cm. langur og vigaði 4410 gr.

8. oktober fingu Majken Petersen og Dánjal Sørensen, Hovi, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3350 gr.

10. oktober fingu Karina Joensen og Eyðstein Jacobsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3550 gr.

11. oktober fingu Bjarta A. og Jónfinn Olsen, Miðvágur ein son, ið eitur Elias. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3750 gr.

12. oktober fingu Kaja og Christian Joensen, Lamba, ein son. Hann var 47 cm. langur og vigaði 2330 gr.

13. oktober fingu Hildigerð Priess og Eyðun Nygaard, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

13. oktober fingu Jóna Thomassen og Zacharias Nielsen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 60 cm. long og vigaði 5310 gr.

13. oktober fingu Rannvá K. Hansen og Gardar Hall, Velbastaður, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4125 gr.

14. oktober fingu Annfríð Haraldsen og Jákup Zachariasen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3225 gr.

14. oktober fingu Karina Arge Gregoriussen og Jákup Gøthe, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

14. oktober fingu Rannvá og Hilbert Blástein, Vestmanna, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4050 gr.

14. oktober fingu Birgit og Niels Juel Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3980 gr.

14. oktober fingu Beinta Hoydal Joensen og Ragnar Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4050 gr.

14. oktober fingu Ann Mari E. og Øssur Kjølbro, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3875 gr.

15. oktober fingu Rannvá á Steig og Jónleif Johannesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3350 gr.

17. oktober fingu Jóhanna og Jónhard Petersen, Toftir, eina dóttur. Hon var 47 cm. long og vigaði 2705 gr.

17. oktober fingu Jensa Jensen og Edmund Djurhuus, Leirvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

17. oktober fingu Hansa Maria og Petur Hans Hansen, Nes, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4035 gr.

17. oktober fingu Laicy Hjelm og Høgni Zachariassen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2950 gr.

18. oktober fingu Súsanna Káradóttur og Dávur K. Glerfoss, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3750 gr.

19. oktober fingu Sunneva Haraldsen og Brian Bernhardson, Miðvágur, ein son. Hann var 59 cm. langur og vigaði 5080 gr.

19. oktober fingu Sóllind og Áki G. Olsen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3550 gr.

20. oktober fingu Sólrun Jørgensen og Uni Hansen, Miðvágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3550 gr.

## Minningarorð um okkara elskaðu ommu

# Berthu Joensen



Omma okkara andaðist í Vesturstovu í Fuglafirði tann 26. juli 2005. Omma bleiv 86 ár.

Góða omma, ja so legði tú árarnar inn og ert nú sloppin heim í tann æviga bústað.

Tú hevur verið okkum ein kær omma og altíð hava vit havt tað gott saman við tær. Tú hevur altíð verið góð til at vísa okkum tín ómetaliga góða kærleika og tað er ikki nakað, ið ein kann taka fyri givið í dag.

Tómrúmið eftir at tú ert farin er ógvuliga stórt, og tað er ein stórur saknur í tær. Tað følist so undarligt, ikki fara ein túr í Vesturstovu at vitja teg. Har tú javnan sat og bant okkurt plaggið til okkum, ja sjálvt til tað síðsta. Altíð hevur tú verið av teimum raskastu.

Sjálvt um tú, ta síðstu tíðina var búsitandi í Vesturstovu, følist tað eisini so undarligt at verða í húsinum í Tøvuni, nú har er so stilt.

Tað var so hugnaligt at sita har og práta við teg, tú fylgdi altíð væl við, og ein kundi føla at tú hevði umsorgan fyri øllum, tú vildi øllum alt tað besta, tað var altíð sjónligt.

Góða omma, tað er nógv, og bara gott, vit kunna siga um teg, vit høvdu øll viljað havt fleiri ár saman við tær afturat, men tað eru ikki vit, ið kunnu stýra tí. Vit eru tó glað fyri, at vit kunnu liva við einum minni um eina ótrúliga góða ommu. Eina ommu, sum var góð við øll, gjørdi ikki mannamun og var altíð klár at hjálpa.

Vit takka Jesuspápa fyri okkara tíð saman við tær, og biða hann um at verða hjá okkum øllum í hesi sváru tíð.

Góða omma, takk fyri alt.

**Janus, Sigrun og Magnus**

## Jákup Petur í Brekkuni 60 ár



24. oktober 2005 fyllir Jákup Petur Petersen í Brekkuni, Klaksvík, 60 ár. Jákup Petur er sonur Bernhard og Zachareu Petersen, og er næstelst av 6 systkjum. Hann sleit sínar barnaskógvar úti í Brekkuni í Klaksvík, og hevur hann eisini bygt sær sítt heim har.

Sum ungur drongur lærdi hann húsasmíð hjá pápabeiggja sínum, Jóhan Petersen, vanliga nevndur Skard, og hevur hetta verið hansara lívsstarv. Eitt tíðarskeið stovnaði hann saman við Esmar Heinesen teirra egna byggivirki "Húsasmíð", og er mangt vælaverkið komið frá teirra hondum. Men tá tíðirnar versnaðu, tá fyrst í 90-unum, gjørdu teir av at steðga teirra virksemi, og hevur hann síðani arbeitt hjá Klaksvíkar kommunu sum handverkari.

Jákup Petur giftist Elnu Frederiksen úr Múla í 1974, og eiga tey trý børn. Bergur f. 1975, Soffía f. 1978, og Símun 1980. Eisini eiga tey abba/ommudøtrina Elnu f. 2000.

Tey hava sum familja, og ikki minst Petur, røkt festi hjá foreldrunum hjá Elnu fyrimyndarliga. Um Petur er at siga, at hann er ein álítandi og nærlagdur arbeiðsmaður og ger ikki nógvan háva úr sær sjálvum. Vit vilja tí ynskja honum hjartaliga tillukku við teimum 60 árunum.

Lesið Sosialin - so eru tit við